## ALMANNASTOVAN

# Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.
Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
Fylgjaraauppgáur Stimbran Umlætting

**Størvini eru hesi:**

**Tórshavn**

1) – at stuðla og stimbra eini 12 ára gamlari gentu, við venjingum og spæli, einsamallari og saman við øðrum. Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá gentuni og verður arbeiðið gjørt í Bridgehúsinum, ið er tilhaldsstað fyri stuðulsfólk og børn.
Tímatalið er **20 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 31.12.03

2) – at stuðla, hjálpa og fara við eini 16 ára gamlari gentu til ymisk frítíðartiltøk og hjálpa henni í samskiftinum við onnur. Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá gentuni og verður arbeiðið m.a. gjørt í Bridgehúsinum, ið er tilhaldsstað fyri stuðulsfólk og børn.
Tímatalið er **20 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 31.12.03

3) – at stuðla einum 11 ára gomlum fjølbrekaðum drongi og fara við honum til viðgerð og onnur tiltøk. Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá dronginum og fer arbeiðið fram í Bridgehúsinum, ið er tilhaldsstað fyri stuðulsfólk og børn.
Tímatalið er **25 tímar um vikuna.**
Neyðugt er at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.
Játtanin er fyribils galdandi til 31.12.03

4) – at stuðla, hjálpa og fara við eini 12 ára gamlari gentu til ymisk frítíðartiltøk. Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá gentuni og fer arbeiðið m.a. fram í Bridgehúsinum, ið er eitt tilhaldsstað fyri stuðlsfólk og børn.
Tímatalið er **20 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 31.12.03

5) – at stuðla og stimbra einum 10 ára gomlum drongi og fara við honum til ymisk frítíðartiltøk. Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá dronginum og fer arbeiðið m.a. fram í Bridgehúsinum, ið er eitt tilhaldsstað fyri stuðulsfólk og børn.
Tímatalið er **25 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 31.12.03

**Sandoy**

6) – stuðulsfólk til 3 ára gamlan fjølbrekaðan drong, **10 tímar um vikuna.**
Arbeiðið fevnir um at umlætta familjuna.
Arbeiðstíðin er skiftandi.
Játtanin er fyribils galdandi í eitt ár.

**Norðoyggjar**

7) – stuðulsfólk til 7 ára gamlan fjølbrekaðan drong, **5 tímar um vikuna.**
Arbeiðið fevnir um at umlætta familjuna.
Arbeiðstíðin er skiftandi seinnapartar, kvøld og vikuskifti.
Játtanin er fyribils galdandi í eitt ár.

8) – stuðulsfólki til 13 ára gamla rørslutarnaða gentu, **10 tímar um vikuna.**
Arbeiðið fevnir um at gera venjingar við gentuni og fara við henni til viðgerð. Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá gentuni.
Neyðugt er at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

9) – at stuðla og stimbra einum 11 ára gomlum drongi við venjingum og spæli.
Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá dronginum.
Tímatalið er fyribils **30 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

10) – at stuðla og stimbra einum 5 ára gomlum drongi og fara við honum til viðgerð og onnur tiltøk.
Arbeiðið verður gjørt við tilknýti til dagrøktina.
Tímatalið er **35 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 31.08.03

**Eysturoy**

11) – at stuðla og hjálpa einum 8 ára gomlum fjølbrekaðum drongi og fara við honum til viðgerð og onnur tiltøk.
Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá dronginum.
Tímatalið er fyribils **25 tímar um vikuna.**
Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.

12) – at stuðla og hjálpa eini 13 ára gamlari fjølbrekaðari gentu og fara við henni til viðgerð og onnur tiltøk.
Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá gentuni.
Tímatalið er fyribils **25 tímar um vikuna.**
Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.

13) – at stuðla og hjálpa eini 10 ára gamlari fjølbrekaðari gentu og fara við henni til viðgerð og onnur tiltøk.
Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá gentuni.
Tímatalið er fyribils **25 tímar um vikuna.**
Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.

14) – at stuðla og stimbra einum 7 ára gomlum drongi og hjálpa honum í samskiftinum við onnur børn.
Arbeiðið er fyri ella eftir skúlatíð hjá dronginum og fer fram í frítíðar-ansingini á Toftum.
Tímatalið er **20 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

15) – at stuðla og stimbra einum 7 ára gomlum drongi og hjálpa honum í samskiftinum við onnur børn.
Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá dronginum og fer fram í frítíðaransingini á Toftum.
Tímatalið er **10–15 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

16) – at stuðla og stimbra einum 9 ára gomlum drongi og hjálpa honum í samskiftinum við onnur børn.
Arbeiðið er eftir skúlatíð hjá dronginum og fer fram í frítíðaransingini.
Tímatalið er 2**0 til 25 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

17) – at stuðla og stimbra einum 4 ára gomlum drongi og fara við honum til viðgerð og onnur tiltøk.
Arbeiðið fer m.a. fram í Stuðulsstovuni Flatarbø, ið er tilhaldsstað hjá stuðulsfólkum og børnum.
Tímatalið er **25 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 30.09.04

18) – at stuðla og stimbra eini 5 ára gamlari gentu við spæli og venjingum.
Tímatalið er 40 tímar um vikuna, tað er eisini møguleiki hjá tveimum fólkum at arbeiða **20 tímar í part.**
Játtanin er fyribils galdandi til 31.08.04

Setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl á tlf. nr. 35 35 10, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22.07.2003.

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.**



FØROYA LANDSSTÝRI

**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
**FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**

# 1. stýrimaður til Fiskiveiðieftirlitið

Eitt starv sum 1. stýrimaður við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, til setan skjótast gjørligt.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávir:**
- Ganga vakt eftir vaktarskipan, sum skiparin fyriskipar.
- Luttaka í dagliga arbeiðinum.
- Útføra tær arbeiðsuppgávur sum eru sambært starvslýsing í SMS-manualinum.
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
- Skipsførara útbúgving.
- Ikki minni vinnubræv enn stýrimaður við handilsskipum á 3. stigi(STCW-regl. II/1 as Watchkeeping Officer).
- Heilsuváttan fyri sjómenn.
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlenskum og enskum máli.
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa.

**Setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. stýrimaður.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnibrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 22. juli 2003 kl. 1200

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið, postsmoga 347, 110 Tórshavn.**

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 517, P/F Leif Niclasen, 450 Oyri.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Leif Niclasen, 450 Oyri(formaður).
**Innkomin sum formaður:** Torbjørn Niclasen, 460 Norðskáli.
**Farin frá sum næstformaður:** Agnes Bundgaard Niclasen, 450 Oyri.
**Innkomin sun næstformaður:** Eileen Niclasen, 450 Oyri.
Stjórn:
**Farin frá sum stjóri:** Leif Niclasen, 450 Oyri.
**Innkomin sum stjóri:** Agnes Bundgaard Niclasen, 450 Oyri.

*Skráseting Føroya tann 3. juli 2003*

*Kristin Balle*


TILBOÐ
Brandt (Blomberg) Vaskimaskinur



WFF1312
• 5,0 kg
• 1300 snúningar
• Orkuflokkur A
Kr. 4.676,-



WFH1670
• 5,5 kg
• 1600 snúningar
• Orkuflokkur A
Kr. 7.196,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Sosialurin 341800

Stórir marknaðardagar
Við sera góðum tilboðum
vikuna út

FLYMO plenuklipparar
kanttrimmarar
runnasaksar
PRÍSDØMI Turbo compact 350 - kr. 925,-

ALUMINIUMSSTIGAR
takstigar
tví- og trýdeildir stigar
trappustigar
stigaføtur
ryggáskrókar
avstandshaldarar
PRÍSDØMI 10 metra stigi - kr. 2.285,-

URTAPOTTAR
uttandura pottar - frosttryggir
urtapottar - leir og glasaðir
urtapottamold
Træ ruskstativ kr. 1.300,-

Vit senda um alt landið!

Handlarnir, har gott er at handla!

THOMAS DAM Á HÁLSI
Heykavegur 3 • 100 Tórshavn
Tel. 311400 • Fax 315574
th-dam@post.olivant.fo

THOMAS DAM

THOMAS DAM
AMBOÐ & MASKINUR
Jónas Broncksgøta 25
Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38

Sosialurin 341800

TILBOÐ

Í dag letur VVS Hornið uppaftur

Allir kranar -20%

Eisini hava vit fingið størri úrvæl av baðirúmsmøblum

Støkk inn á gólvið, ella ring, og vit senda faldarar

Opið er hesar tíðir:
mánadag - fríggjadag kl. 10.00 - 17.00
leygardag kl. 10.00 - 13.00

V.V.S. HORNIÐ
Landavegur 2 · Tórshavn
Tel. 318023 · Fax 310963

Sosialurin 341800